Nr. 247 - 22. desember 2006

# Stytsti dagur og sólin fer at hækka

*Jústinus Leivsson*
*Eidesgaard*
*Jens Kr. Vang*



*Sólin eina viku undan styttsta degin tikin av Sornfelli*

*Mynd Jens Kr. Vang.*

Tað er mikudagur 13. desember upp í Sornfelli. Klokkan er farin nakrar minuttir av middegi og sólin stendur í suðri, tað vil siga, at hon kemur ikki longur upp á himmalin henda dagin. Útsýnið er frálíkt her uppi. Vit síggja sólina standa yvir Trøllhøvda og tað merkir, at allar tær bygdin sum venda skuggasíðuna til sólina síggja hana ikki beinleiðis í dag. Hesar bygdirnar síggja bert sólina, á fjallasíðunum, sum venda móti suðri, beinleiðis móti sólini. Fólkini í skuggabygdunum kenna skuggan enn sterkari, tá ið tey síggja hvussu hon skínur í grannabygdunum og serliga sjónskt er tað hesa tíðina, nú styttsti dagur er í nánd. Skuggabygdir á vetri eru mangar í Føroyum, eitt nú Hellurnar, Elduvík, Tjørnuvík, Leirvík, o. s. fr. Sóllandið í mínum dreymaheimi er vestursíðan á Kallsoynni. Har droymdi eg um at búgva sum smádrongur, tí har skínur hon altíð. Seinni havi eg vitjað hetta sólríka pláss og har vil eg ikki búgva.

Hendan mikudagin 13. desember er sólin lág á himmalinum, og hon fer at standa enn lægri. Tann dagin tú situr við hesi grein í hondini, væl at merkja um tú fært hana útgávudagin, er sólin lækkað sjey minuttir í mun til 13. desember. Í dag, nú vit standa uppi á Sornfelli, reis sólin klokkan 9.47. Hon stendur í ein beinan sunnan hægst á himmalinum klokkan 12.21 og hon setir klokkan 14.55. Dagurin er nú fimm tímar og átta minuttir langur.

Ørvísi sær út í dag styttsta dag, sum er tann 22. Nú rísir sólin klokkan 9.55. Hon stendur í suðri um somu tíð og dagurin er fimm tímar og ein minutt langur. Nú kann hann ikki gerast styttri. Nú vendir og tíð fer at leggjast aftur at degnum, hendur enn at minka. Fyrstu dagarnar er bert talan um sekundir, men longu fyrsta jóladag sæst munur í minuttum. Sjálvasta Jesu føðingardag er dagurin longdur við einum minutti og vit kunnu av sonnum brynja okkum móti ljósari tíðum.

### Ævinleikin og grein 266

Tað er mikudagur tann 13. desember 2006 uppi á Sornfelli. Landið á ljóssíðuni liggur gylt í veikari ljóstgulari vetrarsól. Her er kalt her uppi, kavin brakar undir fótum. Vit standa í polarklima. Her er polarvøkstur sum trýnir fram undan kavanum grønur og seint vaksandi. Røkurnar fyri vestan eru enn grønar, men ongin seyður er at síggja. Tíðin stendur í stað her uppi einas órógvað av skiftandi ljósi og myrkri, regni, kava og stormi. Teir hava mált vindferð upp í 78 kilometrar um sekundið, tað er 280 kilometur um tíman.

Júst hesa somu sjón høvdu vit kunna sæð fyri túsundtals árum síðani, vóru vit á lívi tá. Landslagið soleiðis í allar almindiligheit er óbroytt. Føroyar hava sæð soleiðis út, um vit ikki fara í smálutir, heilt aftur til ísurin frá seinastu ístíð hvarv fyri góðum 10.000 árum síðani. Langt áðrenn mannafótur traðkaði hetta land, hevur sólin staðið yvir Trøllhøvda 13. desember á middegi, í júst somu hædd, sætt av Sornfelli í mong mong túsundár, áðrenn hugtakið føroyingur var upptikið. Sólin hevur skinið hundraðtals øldir á Sornfelli, áðrenn radarakuplarnir sóu dagsins ljós fyrst í sekstiárunum í farnu øld, og hon fer at halda fram at skína, eisini eftir at kuplarnir verða tiknir niður næstu árini. Alt hevur sína tíð, eisini sólin, tó einki røkist fyri at hon sløknar í bræði. Og skuldi hon tað soleiðis heilt óvantað, so er tað ikki mannamáttur, sum er orsøkin til tað.

Kanska Sornfelli verður eitt útferðarmál stytsta dagi í framtíðini, nú Nato flytir úr fjallinum næstu árini. Her er vakurt og óspilt her uppi, eisini ein vetrardag og tú gloymir smákeglið niðri í samfelagnum, har fólk fyri at avstíva sítt ego, royna at ganga mammon ella Gudi til handar eftir ymiskum sannføringum, sum neppa síggjast aftur í tí velduga kosmos, vit eru ein partur av. Ljóssterkasta stjørnan á himmalinum Sirius, minti meg á hetta í gjárkvøldið. Hon er ikki komin undan havsbrúnni fyri eystan enn. Vit síggja hana ikki fyrr enn klokkan 21:13 í kvøld. Hon er bara 8601 ljósár burtur. Ljósið ferðast 300.000 kilometur um sekundið. Tað er livitíðin hjá einum niðurkoyrdum elligomlum føroyskum bili, ferðin hjá ljósinum eitt sekund í kosmos. Tað sigur eitt sindur um Gud, skapari himins og jarðar, um tað sigur nakað um broytingina í grein 266 í revsilógini veit eg ikki.

# Soleiðis halda vit Jól!



*Í Føroyum eru jólamenn á hvørjum tanga, men hetta er ikki galdandi í øllum londum. Á portal.fo fara vit um jólini at fáa innlit í, hvussu føroyingar kring heimin halda jól*
*mynd: Jens Kr. Vang*

**Um jólini fer portal.fo at lata útisetar senda jólaheilsanir heim og greiða frá, hvar tey eru stødd á jólum, og hvussu tey fara at halda jól í ár**

JÓLAHEILSANIR

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Ert tú staddur uttanlands á jólum, kanst tú senda ein teldupost til jol@sosialurin.fo. Í teldupostinum skalt tú greiða frá, hvar tú ella tit eru stødd, og hvussu tit halda jól. Her ber til dømis til at nevna, hvat tit fara at eta, um tit hava jólatræ ella annað, ið hoyrir jólunum til.

Telduposturin eigur at vera í mesta lagi 1500 tekn íroknað millumrúm. Sendi eisini eina mynd av tykkum. Myndin skal vera í minsta lagið 600 x 600 pixels Heilsanir verða lagdar á portal.fo um jólini. Útvaldar heilsanir verða prentaðar í Sosialinum millum jól og nýggjár.